# Nøvn

## Føðingar

28. desember fingu Vivian og Wilhelm Sjóðklett, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3750 gr.

5. januar fingu Rebekka Lisberg og Bergur Djurhuus, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4460 gr.

12. januar fingu Birita Rasmussen og Hans Marius Hansen, Leirvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4210 gr.

12. januar fingu Jórun og Jóhannes Sivertsen, Norðdepli, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

13. januar fingu Karla Maria Gaardbo og Kristian Anton V. Andreassen, Runavík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2960 gr.

13. januar fingu Ingun Mørkøre og Jógvan K. Eidesgaard, Eiði, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4300 gr.

14. januar fingu Elin og Tór-Ingar Akelsen, Sandavági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 4030 gr.

14. januar fingu Esther Rasmussen og Frits Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3730 gr.

15. januar fingu Sunniva í Stovuni og Høgni Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3175 gr.

19. januar fingu Fríða og Jógvan Højbro, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

# Úrmælingur fyllir sjeytifimm



Fá munnu ivast í, at Óli P hevur stórar listarligar gávur. Tað hevur verið at sæð tríggjar ferðir og nú tvær ferðir um vikuna í Sosialinum við tekning á baksíðuni, sum eru endurprentaðar í Skemtbókunum. Her setir hann við sínum beinraknu strikum ljós á dagsins politiska ella samfelagsliga evni. Í hesum høpi er hann fyri mongum árum síðani vorðin heimskendur í Føroyum. Men Óli P hevur eisini nógvar aðrar gávur. Hann er fittur í hondunum, og nógvir eru teir málningar, sum hanga í heiminum á Skála og hjá familju ella vinum og kenningum. Hann er ivaleyst fyrsti føroyingur, sum royndi seg við eini teknirøð, "Stavnur og Snar", sum varð prentað í Sosialinum í árunum 1989 og 90. Hetta var byrjanin til samstarvið við Sosialin.

Miðskeiðis í nítiárunum, tá ágangurin á grindadráp var upp á tað harðasta uttan úr heimi, gav Sosialurin við stuðli frá Mentunargrunninum og Nammco út bókina, "Hvør av øðrum liva má", við tekningum hjá Óla P, sum á skemtiligan hátt lýstu, hvønn týdning grindadráp hevur fyri føroyingar. Umframt á føroyskum varð bókin givin út á fimm øðrum málum. Íslendskum, donskum, enskum, týskum og fronskum.

Óli P hevur gjørt tekningar til eitt hav av bókum, bæði fagrar bókmentir, fakbøkur og skúlabøkur og somuleiðis teknað leiktjøld til fleiri sjónleikir.

Hóast farin um tey sjeytifimm er Óli Petersen sera skarpur í ovastu rók, og á ongan hátt merkist aldur á honum andaliga. Hann er framvegis ógvuliga skjótur at gjøgnumskoða eina ávísa støðu; tað verði seg samfelagsliga, politiska, ella tá tað kemur til, hvørji motiv framstandandi persónar í føroyska samfelagnum hava í teimum ymsu málunum.

Vanliga hyggja lesarar fyrst á forsíðuna á einum blaði ella avís. Men mong sigast tey at vera, sum fyrst kanna baksíðuna á Sosialinum fyri at síggja, um ein tekning hjá Óla P er í, áðrenn tey venda blaðnum við og fara undir forsíðuna. Óli P hevur fingið fleiri virðislønir fyri sítt langa yrki sum teknari og samfelagsrevsari.

Hóast sera skemtingarsamur og hugnaligur at vera saman við, so er Óli P ein rættiliga privatur persónur. Hann trívist best í heiminum hjá sær og konuni Súsonnu á Skála, hagar hann flutti úr heimbýnum Klaksvík mitt í sekstiárunum, tá hann fekk starv at tekna nýbygningar á Skála Skipasmiðju. Nógv eru tey skip, sum framvegis eru í vinnu, ið Óli hevur teknað innrættingina av. Tá skipasmiðjan fór av knóranum mitt í áttatiárunum, gjørdi Óli av royna seg sum skemtiteknara burturav, hóast hann beinanvegin fekk boðið arbeiði aftur, tá skipasmiðjan lat uppaftur við nýggjum eigarum.

Tað hevur ongantíð staðið á at hava nóg mikið at tikist við, og Óli P kann framvegis nærmast velja og vraka ímillum tær uppgávur, sum hann verður heittur á um at gera. Tí er eisini pensjónstilveran fyribils útsett, tí honum dámar so væl tað, hann fæst við.

Óli eigur eina dóttir og tvey abbabørn, sum honum dámar væl at fáa vitjan av í hugnaliga heiminum á Skála.

Hjartaliga tillukku við teimum 75 árunum mánadagin 24. januar, Óli Petersen. Vit síggja fram til enn fleiri tekningar frá tínari hond, har tú lýsir føroyska samfelagið á tín skemtiliga, beinrakna og gløgga hátt.

**kári**

### Frálandavinnan vestan fyri Hetland:

# Nýggjur føroyskur marknaður

Nú oljuvirksemið vestan fyri Hetland økist og nærkast føroyska markinum betrast eisini møguleikarnir hjá føroyskum vinnulívi at veita vørur og tænastur til frálandavinnuna nær markinum. Føroyskar fyritøkur hava í nøkur ár latið vørur og tænastur til bæði oljuskip og oljupallar í bretskum havøki tó í avmarkaðan mun. Tað eitt stórt ynski hjá hesum fyritøkum at kunna menna hesa gongdina.

Herfyri fingu vit so enn eitt prógv um, at oljuvinnan, sum arbeiðir vestan fyri Hetland, eisini sær Føroyar sum ein framtíðar marknað, tá risastóra veitingarskipið Sea Viking kom á Havnina fyri veður og fyri at umvæla sær útbúnaðin tað brúkar í sambandi við eftirlit av útgerð á havbotninum á Schiehallion oljuleiðini nær markið.

Skulu føroyingar síggja fram til at fáa lut í veitingum til frálandavinnuna hinumegin markið, so mugu vit eisini sjálvi royna at marknaðarføra okkum heldur skiparin á norska veitingarskipinum Sea Viking. Vit mugu royna at fáa samband við stóru oljufeløgini, sum




*Subsea Viking umvældur av Mestfólki. Sea Surveyor, hitt oljuskipið, ger kanningar fyri Statoil*

*Mynd Jan Müller*



*Mouritz Mohr, stjóri á Mest og Árni Dam, umboð saman við skiparanum á Subsea Viking*

*Mynd Jan Müller*

eru fyristøðufeløg. Og í Føroyum fegnast stjórin á Mest, Mouritz Mohr um, at oljuvinnan vestan fyri Hetland brúkar føroyskar tænastur sum eitt nú at gera umvælingar her. Eisini umboðsmaðurin Árni Dam fegnast um, at henda fyri okkum nýggja vinnan sær Føroyar sum ein framtíðar marknað.

Jan Müller vitjaði umborð á Sea Viking og hitti skipara, stjóra á Mest og umboð fyri skipið.

**Hoyrið reportasjuna í Rás2 mánamorgunin klokkan 9.30.**